## Eisini lýtt

Í gjár skrivaðu vit, at januar mánaði hevur verið óvanliga vátur í Danmark, og nú vísa tølini hjá veðurstovuni, at tað hevur eisini verið óvanliga lýtt í Danmark hendan síðsta mánaðin. Til í gjár var meðalhitin 5,0 stig, og tað er beint oman fyri gamla metið frá 1989, sum var 4,9 stig. Orsøkin til lýkkuna er, at hann hevur ligið av vestri tað mesta av januar, og tann nógvi vindurin hevur gjørt, at tað hevur eisini verið lýtt um náttina, sigur DMI.

## Ferja á land

Norska ferjan »Nordkapp«, sum er á ferð suðuri við Antarktis, rendi í gjár á land, men tað eydnaðist skipinum at sleppa avaftur uttan hjálp. Tað er kortini greitt, at skipið hevur fingið skaða í botnin, og í dag skuldu bretskir kavarar fara niður at kanna skaðan. Reiðaríið hevur gjørt av, at »Nordkapp«, sum er eitt skjóttgangandi skip, skal til Argentina saman við einum øðrum skipi. 294 ferðafólk eru við ferjuni, og manningin telur 76.

Umfatandi verkætlan:

# Børnini hava rætt

**Ungdómsportalur, undirvísingartilfar og barnaráðgeving eru nøkur av liðunum í einum umfatandi arbeiði hjá Barnabata, ið vil upplýsa føroyskum børnum um rættindi teirra**

BARNARÆTTTINDI
*Finnur Jensen*
*finnur@sosialurin.fo*

Ein tann mest umfatandi verkætlanin, ið viðvíkir føroyskum børnum, fór í dag av bakkastokki. Í meir enn eitt ár hevur ein arbeiðsbólkur saman við Barnabata, umframt í samstarvi fleiri kommunur, feløg og privatar fyritøkur, arbeitt við ætlanini, ið nevnist »Tú Hevur Rætt!« Endamálið er at kunna føroyska ungdómin um tess rættindi, og nógv er longu komið av skafti. Millum annað er ein rúgva av undirvísingartilfari gjørd til fólkaskúlanæmingar, ein nýggjur ungdómsportalur er komin á alnetinum og ein barna- og ungdómsráðgeving setti seg við telefonina í dag.

### Gud og Allah

Tað er Annlis Bjarkhamar, ið samskipar stóru verkætlanina, ið virkar fram til nýggjárið. Hon heldur tað vera týdningarmikið, at børnini vita, hvørji rættindi tey hava.

– Vit hoyra ov lítið um rættindini hjá børnum, hóast Løgtingið longu í 1992 samtykti ein ST-sáttmála, ið tryggjar hesi rættindi. Børniniw skulu vita, at tey hava sjálvstøðug grundleggjandi rættindi, og verkætlanin er millum annað ein roynd at gera vart við hesar umstøður, sigur Annlis Bjarkhamar.

Undirvísingartilfarið, sum verkætlanarbólkurin hevur framlett saman við Bókadeildini hjá Lærarafelagnum, er býtt upp í tríggjar ymiskar útgávur, har altit verður tikið til aldurin og menningarstøðið hjá næmingunum. Tilfarið skal upplýsa og eggja til samrøðu, kjak og innlit í rættindini hjá børnunum. Nøkur av evnunum er eisini nakað kontroversiell. Til dømis leggur nakað av tilfarinum til børnini millum 10 og 12 ár upp til eitt kjak um trúarfrælsi. Í skrivliga tilfarinum verður nevniliga lagt upp til, at vinarlag einki hevur við Gud ella Allah at gera.




*– Vit hoyra ov lítið um rættindini hjá børnum, sigur Annlis Bjarkhamar, sum saman við einum verkætlanarbólki, hevur lagt lunnar undir einum víttfevnandi átaki, ið skal upplýsa børn um teirra rættindi*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Portalur og ráðgeving

www.eg.fo eitur ungdómsportalurin, ið tendraðist á alnetinum í dag. Ætlanin við portalinum, ið er ætlaður teimum 12 til 18 ára gomlu, skal mánaðarliga lýsa áhugaverd ungdómsevni og tiltøk, ið viðvíkja teim ungu.

Børnini fáa nú eisini sína egnu barna- og ungdómsráðgeving. Her kunnu børnini spyrja um alskyns evni, so sum einsemi, vinarlag, kærleika, kynslív, sorg, kynsligan ágang, ja, eitthvørt, ið tey ynskja at práta um. Sum nakað spildurnýtt eru ráðgevarnir tøkir umvegis bæði telefon, kjatt og brævakassa. Og so er tað eisini ókeypis at ringja 80 7010, ið er telefonnummarið hjá ráðgevingini, sum í fyrstu syftu einans er opin mánadagar og hósdagar frá kl. 14 til 22.

Ætlanin er harmumframt at skipa fyri ítøkiligum tiltøkum komandi mánaðirnar. Til dømis arbeiða ung í MáF við einum sjónleiki um happing.

# Níggju føðingardagar sama dag

**Mikudagin hildu átta børn og eitt starvsfólk føðingardag í Frítíðarskúlanum í Hoyvík. Føðingardagarnir vórðu lagdir saman, og hetta eydnaðist væl**

BØRN OG FRÍTÍÐ
*Finnur Jensen*
*finnur@sosialurin.fo*

Ein føðingardagur umleið triðja hvønn dag. Tað er kanska nakað nógv í longdini. Tí hava starvsfólkini og tey 166 børnini á Frítíðarskúlanum í Hoyvík í staðin valt at halda ein stór føðingardag hvønn mánað.

– Ein føðingardagur er ein serligur dagur hjá tí, ið fyllir. Men tá føðingardagar nærmast eru gerandiskostur, so missir hesin dagurin tað serliga. Og tað er spell. Tí hava vit valt at sláa allar føðingardagarnar í hvørjum mánaði saman og halda ein stóran føðingardag ístaðin, sigur Levi Mørk, leiðari á Frítíðarskúlanum í Hoyvík.

Mikudagin var nýggja føðingardagsskipanin fyrstu ferð roynd, og hon eydnaðist væl, sigur leiðarin á skúlanum. Átta børn og ein vaksin hildu føðingardag, og hetta varð gjørt við barnasangi, kaku og bollum.

Frítíðarskúlin í Hoyvík fekk annars eina óheppna byrjan í fjør. Arbeiðið at gera skúlan var ikki heilt liðugt, tá skúlin lat upp, og hetta skapti ávísa umrøðu av skúlanum í fjølmiðlunum. Tað hava tey á skúlanum harmast nógv um. Men hesi viðurskifti eru nú komin í rætt lag. Og sum skilst trívast bæði børn og vaksin í nýggja umhvørvinum.

Fleiri av starvsfólkunum eru annars ítróttarfólk, og hetta sigst avspegla gerandisdagin hjá børnunum, sum spæla nógvan hondbólt og fótbólt. Skúlin verður eisini av summum róptur »Ítróttarskúlin í Hoyvík«.




*Níggju føðingardagsbørn hildu føðingardag á Frítíðarskúlanum í Hoyvík. Tey eru Sólja Jacobsen, Áron Fjallheim, Bogi Húsgarð, Jeanett Ryggshamar, Pætur Dalsgaard, Andrea Vang, Gunvá Askham og Karin Simonsen*

*mynd: Jens Kristian Vang*